


# Turrur brunnur við føroyska markið

**Jan Müller**

12.02.2014 - 17:23

Oljan.fo

Stórur spenningur er ikki bara í Bretlandi men eisini í Føroyum, tá leitibrunnar verða boraðir á Atlantsmótinum. Og tað gongur her sum alla aðrastaðni. Har eru fund og har eru turrir brunnar.

Eftir at fleiri týðandi fund, Cambo, Rosebank, Glenlivet, Tornado, Laggan Tormore eru gjørd eystan fyri føroyska markið mongu seinastu árini, kemur tað tó eisini fyri, at leitibrunnar á nýggjum leitileiðum eru turrir ella einans goyma smáar nøgdir av kolvetnum. Nevnast kunnu sera kostnaðarmiklu brunnarnir Lagavullin har norðuri og North Uist longur syðri.

Nú sigur bretska oljufelagið *Ithaca Energy* frá, at boringin á tess 204/18b-2A á Handcross leitimiðinum skamt frá føroyska markinum vestan fyri Hetland gjørdist eitt vónbrot. Brunnurin var turrur.

Stórar vónir hava verið til júst hesa boringina, tí hon liggur í einum øki við fleiri olju- og gassfundum, eitt nú Suilven og Tornado og einans 13 fjórðingar frá Schiehallion oljukelduni (Quad204).

Itacha Energy keypti í fjør oljufelagið Valiant Petroleum, sum leingi varð partur av føroysku oljuleitingini, men tók seg úr Føroyum í fjør og tók harvið yvir fleiri av tess loyvum á Atlantsmótinum.Hini feløgini í Handcross leitibrunninum eru umframt Ithaca (25%), Edison International (25%), RWE Dea UK SNS (20%), Sussex Energy (15%) and Oyster Petroleum (15%).

Oyster Petroleum, sum er eitt av nýggju oljufeløgunum á Atlantsmótinum (økið millum Hetland og Føroyar), keypti seg nýliga inn í fleiri av loyvunum hjá Itacha.

Hesin seinasti leitibrunnurin er tí eitt stórt afturstig fyri felagið og eisini hini feløgini í Handcross-leitimiðinum, sum annars var mett at goyma 115 mill. tunnur av olju.

Tað var boriskipið, Stena Carron, sum stóð fyri boringini, ið liggur miðskeiðis millum stóru Schiehallion kelduna og føroyska markið, sunnan fyri Cambo oljufundið.

Keldur:

Itacha Energy

Choppen, Robert

BP (Kort) : Umhvørvisætlan fyri útbygging av Schiehallion oljukelduni (Quad204)

http://www.bp.com/content/dam/bp/pdf/scotland_aad_environmental_statement_Quad204.pdf

PS. Minnist til at trýsta til høgru á mynd (Størri mynd)






